## Eg meini tað



**Óla Jákup Rólantsson, útvarpsmaður**

# De høje kontraherende parter

"Hendes Majestæt Danmarks Dronning (tey hava heilt slept "af Guds Nåde" og "de venders og gothers") er Færøernes Statsoverhoved. Dronningens repræsentant er Færøernes lagmand.....!"

Soleiðis!

Hesin barberaði cancelii-artikkul-15 í uppleggingum frá landstýrinum til donsku stjórnina frøddi mangt sambandshjarta. "Oyjøsus", tók ein eldri fornem og hástór sambandsk havnarkona til tvørturum diskin í einum blómuhandli herfyri, -"so eru vit væl stadigvæk i kongaríkinum. Og so er Margretha den Anden væl stadig okkara dronning!"

Tja. Er tað nú heilt rætt, hugsaði eg uttan at blanda meg. Forrestin eisini rættiliga líkaglaður. Men ein gamal vinmaður, sum hevur gingið í fullveldiskoti síðani Høgni Hoydal varð føddur, kundi ikki halda sær. Kom sum ein annar Livingstone út úr eini stórfingraðari hangandi gummiplantu í útsynningshorninum, mutlaði okkurt um Commonwealth-skipan og idiotiskar kransakøkufigurar, og fór á dyr við eini mini-rhododendron fyri 40,- kr í hondini.

Eg var fangaður. Sambandskonan hevði í øllum sínum veldi sperrað útgongdina millum tveir urtapottar í býráðsstødd. Minti um eina gamla koloniharrafrúu. – "Tú tín lortungi, tit skræða tykkum um alt, og eisini hattar. Verður Margrethe Den Anden framdeilis dronning eftir leysrívilsið, ella hvat? Verður hon ikki dronning fyri alt rigsfællesskabet????"

Sakin!

Slapp rímuliga burtur úr fyrsta parti at greiða frá muninum millum ríkis- og ríkjafelagsskap. At ríkjafelagsskapur var fleirtalsorð, at vit ikki fóru úr men inn í ein ríkjafelagsskap, har Margretha framvegis var drotning, eins og enska drottningin var drotning fyri australar o.s.fr. Men harífrá og til at fata, at Grønland kortini framvegis varð verandi í ríkisfelagsskapi við Danmark, og at samráðingarnar skuldu vera millum Føroyar øðrumegin og "Kongeriget Danmark" hinumegin, tað var ov langt fyri gomlu, tí nú sótu føroyingar eftir hennara tykki knappliga báðumegin borðið.

Og so haðanifrá at skilja, at Margretha sjálvt eftir allar uppfyltar fullveldisdreymar framvegis verður "statsoverhoved", og at umboðsmaður hennara er tann til eina og hvørja tíð sitandi løgmaður – nei, tá bannaði hon, tí einki skuldu hon bukka og skraba fyri nøkrum fullveldisløgmanni ella "stedfortredara", óansæð hvussu nógv fjaðraprýði hann fekk. Hon fór á dýr við havgron, sjabbandi ein posa við hvítum og reyðum blómum, hon skuldi pynta stovuvindeyguni við til "dronningens fødselsdag". Altso Ingrid.

Nú var eg bara 5 minuttir ov seinur at heinta betra partin frá arbeiði, og helt meg vera slopnan. Út millum urtapottarnar fekk eg annan fótin út um, tá eg hoyrdi uppgevandi røddina á henni aftur um húsarhornið, stevnandi við fullari ferð aftur ímóti mær:

"Hvat betýðir De Høje Kontraherende Parter??????"

Ufffff! Eg fekk lirað eina orðabókaramsu av mær um sáttmálar og semjur og kontraktir, og ikki minst um javnbjóðis sáttmálapartar, lirkaði meg inn í bilin og royndi at fáa hurðina aftur, meðan eg startaði og fekk trygdarbeltið uppá.

-"Jammen, jammen........." var tað seinasta eg hoyrdi, meðan eg í speglinum sá hana veipa Dannebrogslitirnar í plastiksposanum yvir høvd. Mátti løtu seinni geva einum ungum praktikkanti rætt, soleiðis sum yrkadagur mín fer í smápetti av irriterandi og tíðarkrevjandi práti. Hann helt tað skuldi itið "De Høje Irriterende Parter".

Forrestin gloymdi eg at keypa rósurnar.

**SJÓNLEIKARIN.** Fyri 12 árum síðani fekk ommusystur hansara hann at spæla sjónleik, og tann royndin eydnaðist so væl, at hann hevur spælt minst ein leik um árið síðani



**– Tað vísir seg ofta at fólk sum hava tikið útbúgving sum sjónleikarar, enda við bara at spæla álvarsamar leiklutir. Sjálvur dámar mær líka væl skemtileikirnar. Mynd: JH**

# Familjusjúkan

*Fróði Løkságarð*

Ommusysturin fekk hann at spæla sjónleik.

Tað var fyri meira enn 10 árum síðani, og hann hevur spælt sjónleik á hvørjum ári síðani.

Jan Gardar er 28 ára gamal og starvast dagliga sum leiðari í Keypssamtøkuni í Klaksvík, har hann byrjaði sum krambakallur fyri nøkrum árum síðani. Umframt tað rekur hann eisini dansistaðið Lognbrá, sum heldur til í KÍ-høllini.

Tá Jan ikki flýggjar húsarhaldsvørur yvir diskin í FK-handlinum í Nólsoyar Pálsgøtu ella spælir nýggjasta tónleikin fyri ungfólki í Lognbrá, er hann stundum at finna á pallinum í mentunarhúsinum Atlantis.

Har hevur hann havt sína gongd í nógv ár. Jan byrjaði sína yrkisleið sum sjónleikari í 1988, tá Klaksvíkar Sjónleikarfelag setti upp leikin *Mio mín Mio.* Síðani hetta hevur nærum á hvørjum árið verið boð eftir Jan, tá nýggjur leikur var á skránni.

**Familjutraditión**

– Tað er ein familjusjúka haldi eg, sigur Jan, tá hann skal grundgeva fyri, hví hann á fyrsta sinni fór undir at spæla sjónleik.

– Adelborg Linklett er ommusystur mín, og tað var nokk hon, sum lokkaði meg at byrja av fyrstan tíð.

– Omma plagdi eisini at spæla sjónleik. So Jan heldur, at tað er fyrst og fremst av arviligum orsøkum at hann fór undir at spæla sjónleik. Sjálvur hevur Jan onga útbúgving innan sjónleik, men við tólv árum á baki, sum aktivur limur í Klaksvíkar Sjónleikarfelag, er Jan at rokna sum ein av garvaðu leikarunum í felagnum.

– Eg havi onkuntíð fyrr spælt mær við tankan um at royna at sleppa inn á sjónleikaraskúla, men tað bleiv ongantíð til nakað. Sjálvur er hann ikki so keddur av hesum.

– Tað vísir seg ofta, at fólk, sum hava tikið útbúgving sum sjónleikarar, enda við bara at spæla álvarsamar leiklutir. Sjálvur dámar mær líka væl skemtileikirnar.

**Sera tíðarkrevjandi**

Jan hevur fleiri ferðir spælt sær við tankan um at gevast við sjónleikinum og lova øðrum leikarum framat. Men tá eitt hálvt ár er farið eftir seinastu sýning av einum leiki, og fyrireikingarnar til næsta leik so smátt eru byrjaðar, so kemur hugurin til sjónleikin aftur.

– Frá tí, at farið verður undir venjingarnar, ganga vanliga tveir mánaðar við harðari venjing, áðrenn alt er fingið upp á pláss, og leikurin kann frumsýnast.

– Ofta er buldraligt og nógv verður rópt og skeldað, men tá so alt er fingið upp á pláss, gevur tað heila meining aftur.

Tey tólv árini, Jan hevur fingist við at spæla sjónleik, er tað nærum blivið til ein leik um árið.

**Vilja hava undirhald**

Klaksvíkar Sjónleikarfelag er serliga kent fyri at leggja seg eftir at spæla skemtileikir, men eisini leikir við meira álvarsligum innihaldi hava verið á skránni.

– Vit hava roynt at varierað tað eitt sindur, sjálvt um tað ikki rættuliga hevur verið annað hvørt ár skemt og álvara. Tað er soleiðis at fólk, sum koma til sjónleik í Klaksvík, vænta at síggja ein skemtileik. Hetta ger, at vit í ein ávísan mun hava lagt okkum eftir teimum lættaru leikunum.

–Velja vit at spæla onkran meiri krevjandi og álvarsaman leik, koma nógv færri fólk til sýningarnar.

– Klaksvíkingar vilja hava undirhald, sigur Jan.

Hóast hetta, so hevur eisini verið pláss fyri álvarsamari leikum, tann seinasti var *Salka Valka.*

– Tað er ein nógv størri avbjóðing fyri leikararnar at skula vera við í einum tílíkum leiki, men fyri felagið hevur tað ofta roynst illa.

Jan hevur sjálvur bara havt minni leiklutir í álvarsomu leikunum.

– Teir smáu leiklutirnir eru fyri meg teir nógv truplastu. Tað er ikki lætt at skula liva seg inn í ein slíkan persón, tí har er ofta so lítið at halda seg til. Ymiskt er broytt, síðani Jan á fyrsta sinni trein á pallin í Atlantis.

– Reint leikliga dugi eg ikki rættuliga at meta um tann serliga broytingin er hend. Hinvegin eru umstøðurnar at leika undir, broyttar rættuliga nógv til tað betra, sigur Jan avgjørdur. Atlantis var fyri einum tveimum árum síðani umvælt, og stórur partar av húsinum vóru tá gjørdir av nýggjum, eitt nú var pallurin vaksin, og nýggj høli vórðu gjørd í kjallaranum til at venja í.

**Tíðindablaðið Sosialurin. Postadressa:** Postboks 76, 110 Tórshavn. **Telefon:** 311820. **Telefax:** 314720. **Email til 2'aran:** eydun@sosialurin.fo. **Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller. **Blaðstjóri:** Eyðun Klakstein. **Layout og uppseting:** Tíðindablaðið Sosialurin.



# Gamli motorurin hjá Finni

**MOTORUR.** Á Tvøroyri er Finn Andreasen farin undir at gera í stand ein gamlan Alpha bátamotor. Motorurin er frá 1904 og verður settur í uppruna stand



**Finn og fostursonurin Ian, ið er lastbilmekanikari, vísa fram nærum 100 ára gamla motorin, sum verður settur í uppruna stand. Enn er nakað eftir á mál. Myndir: Dagfinn Olsen**

*Dagfinn Olsen*

Finn Andreasen á Tvøroyri rekur bensinstøð og hevur bilverkstað. Áhugin fyri motorum er stórur og Finn hevur sett sær fyri at gera í stand ein gamlan motor, sum hevur verið í familujni í 75 ár og Finn greiðir frá, at fyrr sat motorurin í eini jollu, ið teir plagdu at sigla við á fjørðinum.

- Hetta er ein Alpha motorur. Hann kom til Føroya í 1904. Hann, ið var umboðsmaður fyri motorarnar, var gamli Niels Juel Mortensen á Tvøroyri. Jørgin Mortensen, róptur Jørgin Smið, keypti motorin frá honum og pápi mín keypti motorin frá Jørgin Smið, so motorurin hevur verið í okkara familju í eini 75 ár, greiðir Finn Andreasen frá.

**Sally sakk**

Báturin, sum motorurin var í, var ein jolla, ið nevndist Sally. Hon er ikki til longur. Vit brúktu bátin til 1956. Tá sakk hann á fjørðinum og lá eini 10 dagar, áðrenn hann varð tikin uppaftur. Tveir tímar seinni sigldi hann aftur og tað høvdu motorarnir neyvan gjørt dag, heldur Finn.

Tá báturin sakk, sigldi Finn sum fýrbøtari við Rankanum. Skipari á Rankanum tá var Hans Mortensen, vanliga nevndur Hans hjá Palla í Mýrini.

- Meistari umborð var ein hvalbingur, ið nevndist Wilhelm Sejer Hansen. Wilhelm kom so út til mín. Eg haldi tað var í juni ella juli mánað í 1956. Hann bað meg fýra upp, tí vit skuldu til Onglands eftir koli. Kol varð tá goymt á Drelnesi. Vit gjørdu av at sigla á Drelnes við jolluni, greiðir Finn frá.

- Vit sigla so inn á Drelnes og eg bindi jolluna aftur undir hekkuna á trolaranum, so hon kom afturum trolaran. Eg hevði biðið ein leiða jolluna longur fram á miðjuna og binda hana har, men tað hevði hesin gloymt. So bakkar trolarin frá og jollan kemur undir hekkuna. Hon drakk sjógv og sakk á miðjum fjørði á umleið 19 metra dýpi. Hon lá so, til vit komu aftur úr Onglandi. Vit vóru einar 10 dagar burtur, sigur Finn og leggur afturat, at tað vóru menninir á bedingini, ið hjálptu at taka hana upp.

- Skiparin setti boyu, har hann metti, at jollan lá, áðrenn farið varð til Onglands. Tað vísti seg, at hann var á so góðari leið, at boyan var bert einar 2 metrar frá jolluni og tí var lætt at seta fast, minnist Finn.

- Pápi mín arbeiddi sum smiðumeistari á bedingini. Allir bedingsmenninir komu til hjálpar. Samanhaldið var gott tá. Mann hjálpti hvørjum øðrum tá og alt varð ikki gjørt upp í pengum. Kavari fór niður, tað var Hemming Jespersen, og sandbáturin hjá kommununi, Karla, tók jolluna upp. Hon hekk so upp at síðuni á sandbátinum, og hekk í bumminum, meðan vit oystu hana tóma. Tveir tímar seinni sigldi hon, sigur Finn.

Jollan varð nýtt á fjørðinum á Tvøroyri, men eisini varð farið við henni í grind í Hvalba, Vági og aðrastaðni. Eisini varð jollan nýtt til útróður.

**Bita fyri bita**

Motorurin hevur staðið hjá Finni tey seinastu mongu árini.



**Samansettur vigar nærum 100 ára gamli motorurin eini 400 pund**

- Fyri eini 17 árum síðani fóru vit at tosa um, um motorurin mundi fara í gongd. So fóru vit at putla við hann, og tað vísti seg, at hann fór í gongd, greiðir Finn frá.

Síðani hevur eingin rørt motorin, men nú er Finn farin eftir honum aftur. Og tað er ikki løtuverk, ið fer fram á verkstaðnum hjá Finni í Øravíkarlíð.

- Vit hava tikið hann líka í botn, bita fyri bita. Alt sundur, hvørt petti. Síðani skal hann savnast aftur. Versonurin, Knút Hentze Nielsen, hevur gjørt fundament úr eik undir motorin, sum er sera snøgt, sigur Finn.

**Petrolinum, ráolja og lýsi**

Finn metir motorin at vera millum elstu motorar í Føroyum. Hann hevur kannað, hvussu motorurin kom til Føroya. Hann hevur funnið útav, at eitt skip hjá Niels Juel Mortensen, ið kallaðist Ingrid, fór í 1903 til Danmarkar at fáa motor settan í. Á heimferðini hevði hon í lastini fleiri smáar bátamotorar, og soleiðis er motorurin há Finni komin til Føroya.

- Um tað mundi fóru menn, teir hjá Johan hjá Dánjali, undir at seta motorar í smábátar. Teir høvdu verkstað og lítla beding, greiðir Finn frá.

Finn sigur, at motorurin hevur bert tveir hestar, hóast hann er stórur á at líta. Finn minnist, at motorurin var sera driftsikkur.

Talan er um ein gløðihøvdmotor, ið verður hitaður upp. Motorurin nýtir sum brennievni petrolinum, ráolju ella lýsi.

Neyðugt hevur ikki verið at leitað eftir eykalutum, nú motorurin verður gjørdur í stand, tí alllir lutir vóru til staðar. Men víst er, at hetta er ikki arbeiði, ið ein kann skunda sær við og á vegginum á verkstaðnum hanga mangir smærri og størri lutir, ið hoyra til, og sum ikki eru at fáa skil á hjá einum, ið ikki er motorkønur. Men skilligt er, at enn er nakað eftir á mál, hóast bert er eftir at seta saman.

- Av tí, at motorurin er so gamal, var vatntroyggjan í sylindaranum rustað, so nýggj mátti gerast. Hetta er ikki hvørsmansføri, men dugnaligi smiðurin í Vági, Knút Nielsen, loysti hesa uppgávuna væl og virðiliga, sigur Finn.

Samansettur vigar nærum 100 ára gamli motorurin eini 400 pund.

Tá arbeiðið við at savna motorin er liðugt, ætlar Finn at, at motorurin skal vísast fram.

Tá verður óivað høvi at hitta Finn aftur á máli. Finn er góður frásøgumaður og hevur hug at venda aftur til mangt seinni, ið ikki er komið inn á í hesi samrøðu. M.a. er mangt at siga frá tíðini, tá hann vaks upp í Øravíkarlíð og siglast mátti um fjørðin, um ein skuldi á Tvøroyri, skuldi ein ikki ganga ella súkkla, tí bilar vóru ikki nógvir tá.



**Á vegginum á verkstaðnum hjá Finni hanga mangir smærri og størri lutir, ið hoyra til motorin**